From: Djóni Nolsøe Joensen <djonij@bumr.fo>
Sent: týsdagur, 6. juni 2023 17:18
To: Hallur Markná <hallurm@logting.fo>
Cc: Fíggjarmálaráðið <fmr@fmr.fo>
Subject: Status viðv. fyrireikingartilgongdini til fyrsta byggistig, at høvuðsumvæla og umbyggja skúlabygningarnar á Frælsinum

Til Fíggjarnevndina

Víst verður til viðgerðina í fíggjarnevndini tann 12. mai 2023 í máli LM-066/2022 Uppskot til løgtingslóg um fyrsta byggistig at høvuðsumvæla og umbyggja skúlabygningarnar á Frælsinum.

Status við verkætlanini at høvuðumvæla lon 5 í skúlabygningunum á Frælsinum 20 er:

Viðv. útboð av fakarbeiðstøkum á lon 5

- Tekja er bjóðað út 23. mai 2023 við tilboðsfreist og lisitation 13. juni 2023 kl. 14.00
- Fyribils p-øki til 135 bilar á pørtum av fløtuni á Frælsinum er bjóðað út 1. juni 2023 og lisitation verður 22. juni kl. 15.00
- Projektering av útveggjum er í gongd og verður boðin út, soleiðis at arbeiðið kann fara í gongd, um somu leið sum tekjan verður liðug
- Restin av umvælingararbeiðinum (EL, HVS, gólv, loft, máling, v.m.) verður bjóðað út eftir hetta og er ikki í sama mun tengt at veðurlagi

Viðv. projektering

- Projektering av arkitektur, konstruktión, HVS og EL er í gongd. Heildarætlan fyri Fróðskaparsetrið á Frælsinum 20 verður hugsað inn, tá vinnandi arkitektauppskot til felagsbygningin er funnið. Hetta verður í endanum av juni 2023
- Fyri allan bygningin á Frælsinum 20, verður arbeitt fram í móti, at gera eina yvirskipaða heildarætlan í heyst

Viðv. semjuni við Tórshavnar kommunu

- Barna- og útbúgvingarmálaráðið og Tórshavnar kommuna hava skrivað undir skeytini um at Tórshavnar kommuna selur, skeytar og endaliga avhendar kommununnar part av ognini á matr. nr. 1017d og 1031a, 100 Tórshavn, til Føroya Landsstýri
- Barna- og útbúgvingarmálaráðið og Tórshavnar kommuna hava avtalað at ein hædd av teimum trimum, ið Fróðskaparsetrið leigar í Sjóvinnuhúsinum skal vera tøk hjá Tórshavnar kommunu í august 2024 og hinar báðar seinni eftir nærri avtalu

Tíðarperspektiv og tilmæli um víðari tilgongd

Fyri at hava eina góða raðfylgju og skipan av arbeiðinum er sambært Landsverk avgerandi, at arbeiðstøkan við tekjuni kann vera framd í summar. Hetta tí, at tað er serliga viðkvæmt í mun til árstíð og veður. Hartil er avgerandi fyri tilgongdina, at gongd kemur á høvuðsumvælingina av lon 5, soleiðis at serliga skrivstovuhentleikarnir vera nøktandi til ta fyrstu flytingina, sum skal verða á sumri 2024. Tí við umvælingini av lon 5 er møguligt at loysa fleiri av avbjóðingum viðv. flyting av fyrsta triðinginum úr Sjóvinnuhúsinum.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur biðið Landsverk um at halda fram við projektering og útboð í sambandi við lon 5, og um at gera eina heildarætlan fyri allar bygningarnar á Frælsinum 20 har hesir verða partur av Kampus.

Fyri at tekjan og útveggir á lon 5 kunnu verða gjørd í summarhálvuni, er umráðandi at gongd kemur á hetta arbeiðið sum skjótast. Tekjan og P-øki eru bjóða út, men Landsverk hevur ikki kunna fingið tilboðini innaftur, tí ov stutt tíð er fráliðin. Útveggir verður boðið út í næstum. Mælt verður til, at løgtingslógin verður tillagað, soleiðis at hon fevnir um tær tríggjar arbeiðstøkurnar tekja, útveggir og p-øki. Tørvur verður ikki á at hækkað mest loyvdu upphæddina til byggiútreiðslurnar, eins og biðið var um í teldupostinum tann 3. mai 2023.

Tá restin av umvælingararbeiðinum á lon 5 hevur verið í útboðið og útboðsvinnari er funnin, leggur Barna- og útbúgvingarmálaráðið eitt uppskot um broyting av løgtingslógini fyri Løgtingið, har biðið verður um at løgtingslógin skal fevna um høvuðsumvæling av allari lon 5.

Fíggjarmálaráðið er kunnað um málið .

Vh Djóni